# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Kathrinu á Neystabø** fer úr Landssjúkrahúskapellinum í Havnar Kirkju í dag klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju mikudagin 9. august klokkan 13. Tey, sum vilja minnast Kathrinu, kunnu geva eina gávu til Giktafelag Føroya. Konta í peningastovnunum

**Andrea Magnussen**, Søldafjørður, andaðist á Eysturoyar røktar- og ellisheimið 6. august, 86 ára gomul. Kistan fer av røktarheiminum í Runavík mikudagin, 9. august kl. 17.00. Jarðarfeðin verður úr Glyvrar kirkju hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Andreu, kunnu lata Bønhúsinum í Søldafirði eina gávu.

Kistan við **Jósup Henriksen,** skipara, fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18. í Sørvágs kirkju. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14.00. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jósup, kunnu lata eina peningagávu til Sørvágs kirkju.

†

Kunngjørt verður, at kæra móðir, vermóðir og omma okkara

**Andrea Sofie Magnussen**
í Søldarfirði · fødd 21. februar 1920

andaðist 6. august á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi. Kistan fer av Røktarheiminum mikudagin klokkan 17.00.

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju hósdagin klokkan 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Rasmus og Hans Kristoffur**·

*Tey, ið vilja minnast Andreu, kunnu lata Bønhúsinum í Søldarfirði eina gávu.*

†

Min elskede ven, vores kære elskede far, morfar, søn, bror og svigerfar

**Peter Trøst Jørgensen**
f. 4. september 1947 · d. 31. juli 2006.

Begravelsen finder sted fredag den 11. august kl. 13.00 fra Skovvejskirken, Digterparken 1, 2750 Ballerup.

**Gudlaug, Sanne, Tóra, Sverri, Malou Sophie, Svend, Poul, Brian, Monika og Anna**

# Kristian Olsen 50 ár

Í dag, týsdagin 8. august, verður Kristian Olsen í Saltnesi 50 ár. Kristian er gøtumaður, men síðstu 23 árini hevur hann búð í Saltnesi.

Kristian Olsen vaks upp við Gøtugjógv. Foreldrini eru Marna fødd Gunrim og ættað úr Sumba og Jóhan Olsen úr Tøvuni við Gøtugjógv. Tey eiga fýra børn – Óluva sum býr á Argjum, Kristian, Janus í Leirvík og Trygvi í Leirvík.

Kristian var sjómaður í nógv ár. Hann sigldi við gøtubátunum og var ein av ánarunum av Kristinu Logos. Í 1979 leyk Kristian stýrimansprógv, og í 1980 varð hann skipsførari.

Nógvu tey seinnu árini hevur Kristian verið heimamaður. Hann hevur eitt nú arbeitt hjá Hera Thomsen og IRF, og nú arbeiðir hann hjá Føroya Betongsaging, sum svágur hansara Hjaltur Tausen eigur.

Kristian giftist í 1979 við Anniku fødd Andreassen og ættað úr Runavík. Tey eiga fýra børn – Oddvá (1979), Jóhan Magnus (1985), Marna (1987) og Hilda (1991). Oddvá er gift Mortani Hansen av Glyvrum, og tey eiga dóttrina Anniku, sum omman og abbin og øll hini í familjuni eru ógvuliga upptikin av.

Kristian er ein skilamaður. Hann er fyrikomandi, gávuríkur og raskur. Honum dámar væl at vera úti í náttúruni. Hann gongur á fjall og hoyggjar, og góða handalagið og fryntliga medferðin gera, at hann so ofta verður biðin at veita eina hjálpandi hond.

Tey seinastu árini hevur Kristian verið ein av oddamonnunum í arbeiðnum at byggja nýggjan sal til samkomuna í Nebo á Toftum. Í Nebo eru Kristian og hansara ógvuliga trúgv.

Annika og Kristian eiga hugnaligt heim í Rókini í Saltnesi, og har varð føðingardagurin hildin í morgun.

**JH**

### Dagurin í morgin

**9. august. Romanus.** Deyður umleið 250. Halgisøgurnar eru ikki á einum máli, um hann var ein umvendur rómverskur hermaður ella ein kristin prestur. Hálshøgdur varð hann í hvussu so er fyri trúar sakir.

# Ved Stig Jacobsen´s begravelse i Julianehåb Kirke den 4. april 2006




Kære Stig

På vegne af familien på Færøerne og i Danmark er jeg kommet herop til Julianehåb for at følge dig på din sidste rejse og til dit sidste hvilested.

Med rødder tilbage til frihedskæmperen Nólsoyar Páll, som nedkæmpede monopol handelen på Færøerne og en opvækst hos vores bedsteforældre Napoleon á Langanes og hustru Sofia, fik du grundlagt dit livs fundament.

Dine ungdomsår i Tórshavn hos en af dine mostre, fik du din uddannelse som tømrer, som blev dit videre springbræt til Danmark.

Efter en periode i København, gik din videre rejse i 1981 her til Julianehåb, hvor du blev tryllebundet af et eller andet som ingen af os udefra endnu har kunnet forstå.

Hvorfor Julianehåb, når du selv har en så stor familie på Færøerne, og i tider hvor de fleste søger til hovedstæder som København, London eller New-York?

Først efter at være kommet herop i fredags, i det alvorlige ærinde at skulle følge dig i dit jordiske livs sidste timer, har jeg fundet frem til hvad det er, som har tryllebundet dig hertil i de seneste 25 år.

Jo, først og fremmest kvinden i dit liv og familien fra Grønlands sydligste bygd Frederiksdal, som jeg først nu rigtigt har lært at kende. Dernæst den enestående natur som magisk tryllebinder enhver, og sidst og ikke mindst de mennesker og dette samfund, som på en enestående måde giver både plads og rum til hinanden og for hinanden. Her er plads til menneskelige nuancer og forskelligheder.

Kære Stig, igennem dine seneste tre til fire års sygdomsperiode har vi haft mange dejlige stunder sammen på trods af situationens alvor. Fodboldkampe og Formel 1 hørte til dine favoritter og jeg glemmer aldrig din specielle begejstring for Barcelona, som du mente at have en eller anden magisk indflydelse på: Stig sagde for nylig på sin helt egen humoristiske måde: ”mærkeligt, men alle Barcelona´s kampe som jeg ser, – dem vinder de – og dem jeg ikke ser, – taber de –?

Til et møde fornylig i Kristnastovan i København, var du særligt glad for en salme som bl.a. også synges på Wembley Stadion til mesterskabsfinalerne, hvor samtlige tilskuere rejser sig op, og med hånden på hjertet synger af fulde kraft:

**”Abide with me”**

Den blev i søndags efter gudstjenesten her i kirken, via biltelefon, sunget fra Færøerne af en af dine gode kammerater til organist her i Kirken, og på den måde har vi også fundet frem til den grønlandske version i den grønlandske salmebog, som nr. 419, og hvad er så mere nærliggende end at denne smukke salme, også bliver din, og synges for dig her i dag på både grønlandsk, dansk og selvfølgelig færøsk: Ver tú mær hjá, nú sólin fór um sýn

Vores tanker går i denne stund særligt til din mor Thurid i København og til Apo´s og hendes familie, som nu skal videre i livet uden dig.

Vi takker dig Stig for at have beriget vores liv med dit dejlige væsen.

Ære være Stig´s minde.

Netop i denne stund afholdes mindehøjtidelighed i København hvor din nærmeste familie er samlet og synger din smukke salme: ”Ver tú mær hjá, nú sólin fór um sýn”.

**Preben Wichmann**